# Trýstið var ov stórt

**Føroyska fótbóltslandsliðið hevði í løtum takið á skotum, men løturnar vóru ov fáar og stuttar, og so kundi tað valla ganga øðrvísi enn tað sama**

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*



*Eina løtu var føroyska avrikið fløvandi, og útjavningin var uppiborin, men tá alt kom til alt vóru skotar ov sterkir*

**Glasgow:** Sjáldan man føroyska landsliðið hava spælt undir so imponerandi umstøðum, sum teir gjørdu leygardagin, tá útidysturin móti Skotlandi stóð á skránni. Skotar hava søguliga nógv at erpast av, tá tosað verður um fótbóltslandslið, men seinnu árini hevur tað tó verið so sum so við hesum. Ikki minst mundi javnleikurin á Svangaskarði fyri einum ári síðani sita fast í minninum, og tað var fyrst og fremst tann eyðmýkingin, sum skotar nú vildu hevna.

Hinvegin mundu føroysku vónirnar eisini vera góðar. Tað hevur aloftast víst seg, at skotska landsliðið hóskar væl til okkara spælistíl, og mest sum hvørja ferð hevur talan verið um dystir, sum okkara hava havt stóra æru av.

## Styrkisroynd

Tað stóð tó rættiliga skjótt greitt, at her skuldu føroyingar ikki kenna seg alt ov tryggar. Risastóri leikvøllurin, sum millum annað hevur europeisku stadionrekordina fyri áskoðarar, var út ímóti fullsettur. 40.901 áskoðarar, har á leið 40.500 vóru skotar settu karmarnar, og móti hesum formáddi annars hart rópandi føroyski 12. maðurin sær ikki heilt so nógv. Og tá tjóðsangirnir so vórðu spældir, mundu flestu føroyingar kenna seg heilt lítlar. Okkara egni sangur varð spældur við minst hálvum øðrum stigi ov skjótt, so eingin fekk fylgt við lagnum, og so kom tann skotski. Við eini heldur óvanligari útseting av Flower of Scotland syrgdu Caledon, sum eru tríggir tenorar, fyri, at her var eingin ivi um, hvør var á heimabeiti. Showið var flott, og stadion var um at kóka yvir. Men sum føroyingur satst tú við eini kenslu av, at hetta einamest var ein roynd at sýna styrkismunin, longu áðrenn dysturin byrjaði.

## Møguleikin reyk

Og tá hann so byrjaði, so var tað skjótt greitt, at skotar ætlaðu sær stigini. Heldur óvæntað stillaði liðið upp í eini 4-4-2 uppstilling, har kantarnir á miðvøllinum lógu høgt uppi og langt úti, soleiðis at trýstið á føroysku verjuna kundi gerast sum størst. Samstundis var føroyska liðið broytt til eina 4-3-3 skipan, sum ivaleyst var ætla at leggja trýst á skotsku kantarnar í eini 3-5-2. Ein feilmeting, sum fyrstu løtuna tóktist gerast dýr

Og skjótt var hetta eisini um at geva úrslit. Serliga lág væl fyri hjá skotum at koma ígjøgnum í okkara vinstru síðu, har Pól Thorsteinsson hevði trupulleikar av kvika Paul Devlin, og longu heilt tíðliga hevði Jákup eina framúr bjarging.

Tað verður ofta víst á, hvussu týdningarmikið tað er hjá okkara, at gagnnýta møguleikarnar, tá hesir koma. Og næsta løtan sýndi júst týdningin av hesum. Jákup á Borg kom brádliga at standa púra leysur í skotska brotsteiginum, tá Andy Webster fór skeivur av stútaranum hjá Rógva Jacobsen. Kanska visti Jákup ikki, hvussu leysur hann var, og tí gjørdi hann dekan ov skjótt av, men undir øllum umstøðum eydnaðist tað Robert Douglas við eini framúr bjarging at forða bóltinum í kósini móti handara síðuneti.

Og so gekk tað akkurát so, sum tað ikki skuldi. Í næsta skotska álopinum fekk Devlin nakað heppið bóltin framvið Rógva Jacobsen, og tá innleggið so kom, stóð Neil McCann mest sum leysur og heilfluktaði bóltin í meskarnar.

## Góða løtan

Málið festi av álvara í áskoðarafjøldina á Hampden, sum nú tóktist hava sett kós móti endaspælinum í Portugal, men sum so ofta áður, so kom mótstøðumálið onkursvegna væl við hjá okkara. Ferðin varð tikin nakað av spælinum, soleiðis at okkara í nógv størri mun fingu fylgt við. Og tá útjavnandi málið kom, var tað á ongan hátt óuppiborið. Nakrar ferðir hevði verið hótt móti skotska málinum við innleggum úr síðunum, soleiðis at vit til tíðir spældu meira skotskt enn skotarnir sjálvir, og í 36. minutti kom lønin.

Julian Johnsson byrjaði sjálvur álopið, tá hann vann bóltin av Barry Ferguson, men í fyrstu atløgu spurdist bert horna burturúr. Hetta sendi Jákup á Borg innfyri, og tá Robert Douglas so fór skeivur av bóltinum, kundi Julian við einum góðum stútara senda bóltin yvir í handara síðunet.

Skotar vóru eina løtu skelkaðir, men spakuliga fingu teir fatur á aftur. Ferðin varð aftur skrúvað uppeftir, men tað tóktist kortini, sum skuldu okkara halda til hálvleiks. Men tað gekk so ikki. Akkurát ikki.

Í seinastu álopsroyndini fyri steðgin varð Stephen Crawford stungin leysur. Komin at baklinjuni sendi hann væl innfyri, og samstundis sum klokkan rundaði teir báðar minuttirnar, sum vóru lagdir afturat, kundi Paul Dickov stýra bóltinum niður í svørðin og inn í føroysku meskarnar.

## Var útselt

Hetta var sum vátur vøttur hjá okkara monnum, og í seinna hálvleiki fekst ongan tíð sama glið aftur á spælið. Ivaleyst eisini tí skotar alla tíðina royndu at halda fast við høgu leikferðina. Hendan tvingaði okkara menn at renna væl meira, enn gott var, og samstundis seyg tað at kalla orkuna úr monnunum, soleiðis at tað gjørdist sera trupult at fáa nakað skilgott samanspæl, tá bólturin loksins var vunnin. Tí var enn ein føroysk útjavning sjáldan í eygsjón – heldur tvørturímóti. Og so gjørdist skotska stjørnuskotið, James McFadden, næstan tjóðarhetja, tá hann setti seinasta seymin í føroysku kistuna.

Hetta var samstundis fyrsta ferðin, at tað eru farin fleiri enn tvey mál ígjøgnum hjá føroyska liðnum í hesi undankappingini, og tað sigur nakað um, hvussu nær við sensatiónin hevur verið í fleiri førum.

Tað slepst kanska heldur ikki heilt undan at nevna teir so vælkendu marginalarnar hesaferð. Høvdu Føroyar lagt seg á odda við skotinum hjá Jákup, og høvdu skotar ikki fingið hatta málið í yvirtíðini… Sjálvandi viðkomandi spurningar, men eftir dystin hesaferð ber tó valla til at staðfesta annað, enn at betra liðið vann.

## Tunt í verjupartinum

Og tað slepst neyvan heldur undan at nevna, at føroyska liðið hevur ávísar trupulleikar. Ikki minst, tá umskipanir mugu gerast, og soleiðis var eisini hesaferð. Ikki minst kom tað illa við, at Súni Olsen ikki gjørdist klárur, tí hetta undirstrikaði týðiliga, at í verjupartinum er hópurin sera tunnur. Fráveran hjá Jóhannis Joensen gjørdi ikki støðuna betri í so máta, og so vóru sera fá alternativ. Jann Ingi Petersen varð tvingaður á eitt pláss, har hann ikki er vanur at spæla, og tó at Pól ivaleyst var besta boðið til vinstra bakkin, so tykist hann onkursvegna vera eitt sindur skeivt uppá bein, tá hann noyðist í hendan leiklutin. Christian Høgni Jacobsen hevur eisini verið royndur í slíkum leikluti áður, men heldur ikki hann var við hesaferð. Ein loysn kundi kanska verið, at Jens Kristian Hansen var innkallaður sum seinasti maðurin. Hann var eisini í Skotlandi, men tað var uppi á áskoðaraplássunum, og tað var sum so stórt spell fyri føroyska liðið.



*Helgi L. Petersen var nakað óvæntað settur fram í oddin í eini 4-3-3 uppstilling*

Skotland-Føroyar 3-1 (2-1):

## EM-undankappingardystur á Hampden Park, Glasgow

**40.901 áskoðarar**

**Skotland**

1. Robert Douglas (Celtic) – 2. Jackie McNamara (Celtic), 5. Lee Wilkie (Dundee), 4. Andy Webster (Heart of Midlothian), 3. Gary Naysmith (Everton) – 7. Paul Devlin (Birmingham City) (15. James McFadden (Everton) 59.), 6. Barry Ferguson (Blackburn Rovers), 8. Colin Cameron (Waolverhampton W.), 11. Neil McCann (Southampton) – Stephen Crawford (Dunfermline Athletic) (Steven Thompson (Rangers) 75), 9. Paul Dickov (Leicester City) (Gavin Rae (Dundee) 68)

**Gult kort:** Stevie Crawford, 62

**Á beinkinum uttan at koma inn:** Paul Gallacher (Dundee United), Graham Alexander (Preston NE), Maurice Ross (Rangers), Steven Caldwell (Newcastle United).

**Venjari:** Berti Vogts

**Hjálparvenjari:**

**Føroyar**

1. Jákup Mikkelsen (Partick Thistle) – 2. Jann Ingi Petersen (B68), 13. Óli Johannesen (TB), 5. Jón Rói Jacobsen (Brøndby IF), 4. Pól Thorsteinsson (B36) – Julian Johnsson (ÍA Akranes) (Atli Danielsen (KÍ) 85), Fróði Benjamsen (B68), Rógvi Jacobsen (HB) – Jákup á Borg (B36) (Christian Lamhauge Holst (Lyngby BK) 85.), John Petersen (B36), Helgi L. Petersen (NSÍ) (Tór-Ingar Akselsen (HB) 66.)

**Gult kort:** Fróði Benjaminsen, 29, Rógvi Jacobsen, 87

**Á beinkinum uttan at koma inn:** 16. Jens Martin Knudsen (NSÍ), 3. Súni Olsen (GÍ), 21. Andrew av Fløtum (HB), 15. Hans Fróði Hansen (B68)

**Venjari:** Henrik Larsen

**Hjálparvenjari:** Jógvan Martin Olsen

**Fysioterapeutur:** Álvur Hansen

**Lækni:** Jens Pauli Marstein

**Liðleiðarar:** Birgir Hansen og Kári Nielsen

**Dómarabólkur úr Slovenia:** Darko Ceferin, Stevo Govadarevic, Andrej Kokolj og Srecko Kandare